# Læknin segði søgu

Danski læknin Knud Jacobsen, sum hevur verið fastur avloysari hjá læknanum á Eiði í mong ár, dugir annað enn síni læknakynstur. Seinasta hóskvøld var hann á Sunda Bókasavni og segði frá søgum úr Bíbliuni. Sunda kommuna skrivar á sínari heimasíðu, at læknin dugdi sera væl at siga frá, og handrit hevði hann einki. So hóast toran gekk, og tað var ógvuliga illfýsið hetta kvøldið, hugnaðu áhoyrararnir sær við bíbliusøgum frá læknanum.



*Knud Jacobsen dugir annað enn síni læknakynstur (Mynd: Sunda kommuna)*

# Hartar politikararnar

Danski lívfrøðingurin og rithøvundurin Thor Hjarsen heldur, at grønlendskir og danskir myndugleikar hava drálað alt ov leingi við at friða ísbjørnina. Thor Hjarsen sigur, at hóast fleiri ávaringar hevur danska Skóg- og Náttúrustýrið vent tað blinda eygað til. Tað sama hava grønlendskir myndugleikar gjørt, sigur hann. At ísbjørnin nú er friðað fyribils kemst einans av trýsti frá øðrum, skrivar danski lívfrøðingurin og rithøvundurin.



*Hans Andrias Joensen heldur røðu. Undir liðini á honum gumman og mamman, Gudrun Joensen*

*Mynd: Hans Jacob Poulsen*

# Hans Andrias Joensen – ein takksamur reiðari

**Við móttøkuna á Skála leygarmorgunin, tá ið Thor Alpha varð navngivin, segði reiðarin, Hans Andrias Joensen, nøkur orð, har hann serliga takkaði øllum pørtum, sum hava viðvirkað til, at verkætlanin gjørdist veruleiki**

NÝBYGGNINGUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Undir hátíðarhaldinum á Skála legði Hans Andrias Joensen fyri við hesum orðum:

- Thor Alpha skal navn títt vera, segði mamma – og tað má so vera. Eg vóni og biði eftir, at hetta verður eitt eydnisnavn fyri hetta far. At byggja skip er nýtt fyri okkum, og tí er hetta ein sera stór avbjóðing fyri okkum sum reiðarríð.

Hann segði, at hetta er tað, sum felagið hevur sæð fram til í nøkur ár, og serliga spennandi hevur tað verið, síðan teir fyri tveimum árum síðani veruliga fóru í gongd við at tilrættaleggja, hvussu felagið skuldi byggja júst hetta skipið.

- Tað var ikki av tilvild, at vit valdu Skipasmiðjuna á Skála saman við Skipasmiðjuni í Havn at byggja skipið. Skipasmíð av føroyskum handverkarum - eisini sum undirveitarum - er kent sum valaverk.

Hans Andrias veitti eisini Føroya Handverkarafelag eina serstaka tøkk fyri, at felagið gjørdi tað møguligt at fáa handverkarar uttanífrá at gera stálarbeiðið.

- Hetta eiga tit eina serliga tøkk fyri saman við táverandi landsstýri, sum eisini viðvirkaði til, at hetta gjørdist møguligt.

Reiðarin nýtti høvi at takka øllum undirveitarum, Articon, El-Service, Byggiservice, Demich, Radiobúðini, Dofida-Pomerania og øllum øðrum, sum hava viðvirkað til, at hetta far kundi gerast so stásiligt, sum tað liggur her í dag.

Hann takkaði eisini Norsk Veritas og Skipasýninum fyri, at skipið er bygt eftir ásettum krøvum.

– Harnæst - og ikki minst – fari eg at takka skipasmiðjusamtakinum, sum hevur staðið fyri byggingini. Ein serstøk tøkk til Dánjal Andreassen. Eg veit, at tað hevur rikið hart á kíkin viðhvørt, men tú kann í dag vera sera errin av tykkara handverki.

Hans Andrias takkaði eisini Gunnari Mohr, táverandi skipasmiðjustjóra, fyri at hann setti sína undirskrift á byggisáttmálan.

– Eg takki eisini Gunnari fyri góða samstarvið, samstundis sum eg vóni, at samstarvið heldur fram við nýggja stjóranum, Eyðfinni Egholm.

Reiðarin nýtti eisini høvi at takka sínum egna fólki, sum hevur verið serliga nær knýtt at hesi verkætlan.

– Eitt orðatak sigur, at ”et er søkort at forstå - andet er skib at føre”, men eg haldi, vit eisini kunnu siga ”eitt er at byggja skip, annað er at reka skip”. Leiðslan í Thor takkar bæði tykkum, sum starvast hjá okkum á landi og ikki minst tykkum, sum vit hava valt til at stýra okkara nýggja og stásiliga fari.

Hans Andrias bar eisini eina tøkk fram á donskum máli:

Også vil bestyrelsen i Thor takke Fugro, som har troet på os og har gjort det muligt for os at bygge dette skib ved at fremleje skibet flere år frem. Vi kommer at gøre alt, som står i rederiets makt til at gøre en så god arbejsætning som muligt for chartreren.

At enda takkaði Hans Andrias Joensen mammu síni og gummuni fyri sín leiklut, samstundis sum hann ynskti skipara og manning á Thor Alpha blíðan byr.

# Tapti ongan dyst í FIFA 08

**Eftir at 76 dystir vóru spældir í kappingini leygardagin, gjørdist greitt at Mortan Mørkøre av Eiði er Føroyameistari í FIFA 08.**

KAPPING

*Snorri Brend*

**Klaksvík:** Skjótt eftir at kappingin byrjaði, sóu tey umleið 50 fólkini, ið vóru møtt upp, at Mortan var ein serstaka góður FIFA-spælari. Hann tapti í roynd og veru ongan dyst allan dagin!

Kappingin var skipað í seks bólkar har ið fýra og fimm lið vóru í hvørjum. Tá ið bólkaspælið var liðugt var greitt at Aksel, Verner, Høgni, Christiansen, Cotter, Rúni, Mortan og Høgni vóru teir, ið skuldu víðari til fjórðingsfinalurnar.

Í sjálvari finaluni var lagt upp til ein sannan gysara millum teir báðar Mortan og Høgna. Mortan kom framum eftir at Høgni hevði gjørt ein heldur keðiligan feil. Kortini svaraði Høgni aftur og kom uppá 2-1, áðrenn Mortan aftur var á blettinum og gjørdi tað til 2-2 sum var endaliga støðan áðrenn farið var til eykatíð. Her var tað Mortan ið aftur dró tað longsta stráið og vísti sínar framúr dygdir sum FIFA 08 spælari.

Fyrireikarin av kappingini, Jógvan Skorheim og luttakarnir hildu, at hetta átti at vera gjørt aftur. Fólk hildu eisini, at hølini hjá KÍ vóru sera væl egnað til ein slíkan dag.

- Vit hjá EL-IN eru sera væl nøgd við kappingina. Og so er tað bara ótrúligt, at vit kundu fáa fólk higar, ikki bara úr Klaksvík, men kring stóran partin av landinum, segði Jógvan eftir tiltakið.



*Væl av fólki tóku lut í kappingini og væl av fólki hugdu eftir teimum leikandi*